UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn
Føroyar

Tórshavn, tann 19. november 2021
J.nr.: 21/23135-3
At tilskila í svari
Viðgjørt:
Tygara skriv:

Svar upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-078/2021 frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, um tinglýsing

1. *Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera tinglýsing v.m. skjótari at avgreiða?*

Svar

Ultimo august 2021 var málsviðgerðartíðin 10 vikur. Í løtuni - medio november 2021 - er málsviðgerðartíðin 6½ vika. Tað er ikki óvanligt, at avgreiðslutíðirnar eru nakað longri í sambandi við eitt nú summarfrítíðina, tó at avgreiðslutíðirnar í summar gjørdust serliga drúgvar.

Sera nógv skjøl eru latin til tinglýsingar í summar, og fyri at koma íkomnu støðuni til lívs, hevur Umhvørvisstovan framt innanhýsis umraðfestingar og útvegað sær tíðaravmarkaða hjálp.

Við útgangsstøði í hagtølunum fyri seinastu 5 árini kann staðfestast, at umleið 1.500 fleiri skjøl vórðu latin til tinglýsingar í 2020 enn í 2016. Í 2020 vórðu tilsamans 13.165 skjøl latin til tinglýsingar.

Higartil eru 12.194 skjøl latin til tinglýsingar í 2021.

Seinastu 10 árini hevur talið av starvsfólkum, sum burturav arbeiða við tinglýsing, svarað til 2 ársverk, og hetta er ov lítið, tá ið arbeiðsbyrðan er so munandi økt.

Tørvur á eini langtíðarætlan, um málsviðgerðartíðin skal styttast varandi. Ein langtíðarætlan eigur at taka niðanfyri standandi atlit:

A. Upprøðfesting av málsøkinum
   - Økja talið av málsviðgerum

B. Talgild innlating – fyrsta stig ímóti eini fult talgildari tinglýsing
   - Menna sjálvgreiðslur, so tað verður skjótari og lættari at lata skjøl inn til tinglýsingar

- Standardisering av skjølum, soleiðis at færri feilir eru í innlatnu skjølunum til tinglýsingar. Um færri feilir eru í sambandi við innlating, verða eisini færri burturvísingar. Hetta styttir um málsviðgerðartíðina.

- Fyrireiking og førleikamenning í sambandi við at taka tey næstu stigini at menna eina fult talgilda tinglýsing.

2. Um ja, nær kann man vænta, at broytingar verða framdar hesum viðvíkjandi?

Svar

Eitt stig í tilgongdini at talgilda Tinglýsingina varð sett í verk 21. juni 2021, tá ið atgongd til tinglýsingarupplýsingar og -skjøl umvegis tinglysing.fo varð sett í verk. Borgarar, privatar fyritøkur og almennir stovnar hava nú beinleiðis atgongd til tinglýsingarupplýsingar og -skjøl. Hetta merkir, at færri umbønir um upplýsingar koma til Tinglýsingina og við tí fylgir leysgeving av starvsfólkaorku til aðrar uppgávur, m.a. tinglýsing av fastogn. Í hesum sambandi kann vísast á, at Tinglýsingin longu kann staðfesta eina munandi minking í umbønum um at fáa avrit av skjølum.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2022 verður lagt upp til at játta 1,1 mió. til Tinglýsingina. Játtanin er til eina forkanning til talgilda innlating. Talgild innlating er fyrsta stig í gongdini at menna eina fult talgilda tinglýsing til gagns fyri borgarar og vinnu.

Málið hjá Tinglýsingini er, at málsviðgerðartíðin støðugt kann liggja um 14 dagar.

Málsviðgerðartíðin ávirkast av kompleksitetinum í og talinum av skjølum, sum verða latin til tinglýsingar. Talið av skjølum ávirkast av gongdini í samfelagnum; tá ið nógvar sølur eru, eru fleiri skjøl at tinglýsa. Hvør einstøk søla krevur tinglýsing av fleiri skjølum, t.e. skeytir, byrðar og veðbrøv.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 19. november 2021

Vinarliga

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður